# – Eg eri nakað kedd tá teir tapa



*Anna Larsen eigur mong sporini her á vøllinum í Fuglafirði. Hon kann eisini fegnast um ommubørnini (aftarlaga í myndini) eru virkin í fótbóltinum, og brúka mangar løtur saman við bóltinum*

**Uttan góðar stuðlar mundi vera trupult hjá mongum ítróttarfeløgum kring landið. Tá tosað verður um Ítróttarfelag Fuglafjarðar slepst neyvan undan at nevna trúgva ÍF-stuðulin, Onnu Larsen**

FÓTBÓLTSSÁL
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** - Ahnoy, tað er einki at skriva um. Tosa heldur við mannin, Petur!

Anna Larsen vil helst sleppa undan at siga nakað um stóra virksemi sítt innanfelags í ÍF. Hon hevur – uttan stóvegis hóvasták - bara gjørt hetta av áhuga fyri felagnum, - og tað hava so nógv onnur gjørt eisini, og ikki minst saman við henni.

Hesin áhugin hevur víst seg á so nógvar ymiskar mátar: Við at savna inn pening, við at vaska ítróttarklæðir, við at skipa fyri bingo og við at skipa fyri basarum – you name it!

Síðst, men ikki minst hevur Anna havt sína dagligu gongd á fótbóltsvøllinum, tá ÍF hevur spælt. Og tá sagt verður ÍF, so er ikki bert talan um bestu liðini hjá felagnum.

- Mær hevur eisini dámt sera væl at hugt eftir teimum smæstu. Men, hvussu nógvar dystir eg havi sæð, veit eg ikki, sigur Anna Larsen.

Hon var sjálvandi á vøllinum mánakvøldið, tá 1. deildarliðið hjá ÍF spældi - og tapti! - móti B36.

## Trúgv á øllum plássum

Áhugin fyri fótbóltinum er ikki nýggjur, men kom rættiliga fram, tá ein sonur hennara byrjaði at spæla við fótbóltsfelagnum.

Sjálv hevði hon íðkað nakað av ítrótti, men so við og við var tað fótbólturin sum fekk fyrstaplássið, tá talan var um ítrótt.

Hon og maðurin, Petur eiga fimm børn, sum øll hava verið virkin í ítrótti, og nú ommubørnini hava fingið ítróttaraldur, hevur hetta bara verið við til at hildið áhuga hennara fyri fótbóltinum viðlíka.

Hon hevur ikki bert stuðlað við at fara á vøllin sum áskoðari, stuðul og ferðaleiðari, men hevur eisini sitið í nevndini í felagnum. Og á fólki í býnum skilst, at hon hevur altíð verið fús at taka eina hond í við tí praktiska og dagliga arbeiðinum, m.a. við at taka sær av fótbóltsklæðunum eftir ein dyst.

- Hvussu nógvar búnar eg havi vaskað fyri felagið? Tja, tað veit eg ikki - í túsundatali, sigur hon, uttan at nakar farri av reypi og rósi liggur í tí.

## Heima og úti

Áhugi hennara fyri ÍF er gamal, men sjálv heldur Anna, at hon var eitt sindur spentari fyrr enn hon er nú.

Hon eigur sum vera man nógvar løtur á vøllinum í bygdini, men hon hevur somuleiðis verið við ÍF-liðum, tá tey hava leikt dystir á útivølli.

- Fyrr - ja, fyrr, tá kundi vit reisa land og ríki runt til dystir, bæði í Miðvági og aðrastaðni.

- Eingin tosaði um veður og slíkt. Vit fóru avstað við fótbóltsliðunum, um tað var bæði vindur og vánalig líkindi, sigur hon.

## Trupul framtíð

Hjá einumhvørjum ítróttarfelagi er tað altíð ein spurningur um, hvussu væl ungdómsarbeiðið verður skipað, soleiðis at ein kann hava nýggj fólk at taka við, tá onnur fella frá.



*- Nei, tað sum eg havi gjørt, tað er einki at skriva um. Tað eru so nógv sum hava gjørt so nógv fyri ÍF, sigur ein lítillátin Anna Larsen, sum av sonnum kann kallast ein ÍF-sál*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í hesum máli heldur Anna, at her kundi ein havt gjørt meiri við hetta.

- Tað er ongatíð gott, tá ein ikki fær mannað eitt dreingjalið, men má hava tríggjar spælarar úr Kollafirði við á liðnum.

- Og tað er heldur ikki gott, tá ein somuleiðis má hava spælarar úr Kollafirði við, tá ÍF skal manna sítt smádreingjalið, sigur Anna, og harmast samstundis um, at tað somuleiðis hevur verið ógjørligt at manna unglingaliðið.

Hinvegin so kann hon fegnast um, at kvinnudeildirnar eru væl mannaðar á øllum stigum - uttan í bestu kvinnudeildini.

## Óhepnir

Hóast tað fótbóltsliga kundi sæð betri út hjá besta liðinum í felagnum, so hevur tað ikki tikið áhugan hjá Onnu fyri felagnum.

Eins og hinir fuglfirðingarnir so fylgir hon væl við, nær ÍF skal spæla dystir sínar.

- Men hóast alt hetta, so taki eg tað róligt. Einki við at ganga við nervum um dagin ella tílíkt.

- Eg eri glað tá teir vinna. Og eg eri nakað kedd, tá teir tapa ein dyst, sigur hon.

Um ÍF-liðið anno 2005 heldur hon sjálv, at liðið er gott og væl mannað, hóast teir eru niðast á stigatalvuni í 1. deild.

- Jú, liðið er gott, men alt lukkast ikki hjá liðinum.

- Eg haldi, at teir viðhvørt hava verið eitt sindur óhepnir, sigur Anna Larsen.

## Varmakeldukonsert við fýra luttakarum

**Tónleikur:** Eingin varmakelda, uttan eina góða konsert.

Sunnukvøldið kl. 20 verður ein spennandi konsert hildin í Mentanarhúsinum, har fýra rættiliga ymiskir sangarar fara at seta sín serliga dám á.

Í vikuni gav Hallgrím Miðberg út eina nýggja fløgu (umrødd her í blaðnum týsdagin), og nú fáa so fólk møguleika at hoyra henda fyrrverandi bakaran syngja nakrar av sínum sangum.

Honum á baki kemur Maria Andersen, sum er móðir navnframu Lenu Andersen. Nakað herfyri gav hon eina fløgu út, og sum hevur verið nógv spæld í útvarpum og heimum. Nú kemur Maria so til Fuglafjarðar at syngja nakrar av hennara sangum.

Umframt Erlu Hansen og hennara bólk, er eisini eitt annað spennandi navn á skránni hetta kvøldið - Kim Hansen, sum á konsertini fer at spæla egin løg.

**sb.**



## Uppboðssøla og lutaseðlar

**Tiltøk:** Eftir Varmakeldukonsertina inni í Mentanarhúsinum verða tvey áhugaverd tiltøk uttan fyri húsið.

Í fyrstu atløgu er talan um eina uppboðssølu av málningum eftir nýggju av frægu listafólkum okkara, harav flestu teirra eru fuglfirðingar (sí umrøðu aðrastaðni í blaðnum).

Meðan fólk kortini eru savnað uttan fyri mentanarhúsið verður miðnáttarsamkoman hildin. Her verður felagssangur og hornblástur, eins og tann spennandi løtan, tá lutaseðlarnir verða drignir.

Hetta er samstundis seinasta tiltakið á stevnuni í ár.

**sb.**